# Chi - yeee-ha. Voila!!!

**Tað var einki minni eitt brak av eini konsert, tá Kathy Chiavola fór á pallin í Fuglafirði týskvøldið. Ein country og bluegrass stórsigur, har akkustisk ljóðføri og ein stór rødd fyltu hvønn krók**

listastevna føroya 2001

*Dagfinn Olsen*



Tað var við spenningi, at eini 600 fólk høvdu leitað sær í nýggja og sera stásiliga mentanarhúsið í Fuglafirði týskvøldið. Á skránni var country og bluegrass sangarinnan úr Nashville, Kathy Chiavola, umframt Ragnar í Vík og Dupult Kvartettin.

Og tað er ikki ofta, at vit fáa vitjan av víddunum handan hav og hava høvi at uppliva country, sum tað veruliga er.

Men fyrst máttu vit bíða í eini 10 minuttir, tí mandolinleikarin var júst komin við flogfarinum og skuldi líka gerast pallklárur. Hann hevði ligið veðurfastur millum Nashville og Boston. Fiólleikarin settist aftur, men skuldi væntandi koma fram til seinnu konsertina mikukvøldið.

## Top of the world

- Takk fyri!, rópti Kathy á føroyskum, tá hon kom á pall frammanfyri klappandi fjøldini og soleiðis tók hon øll á bóli.

Takk fyri, Fuglafjørður! Og so var ísurin brotin, so sjálvt Havsbrún ikki kundi havt fryst eina eind úr honum aftur.

Bert 3 á palli. Við akkustiskum ljóðførum, um enn styrkt, fyltu tey frá byrjan hvønn krók við kontrabassi, guitari og mandolin. Á bass, ella hundahús, sum tey nevndu hetta, leikti Marky Sanders. Á mandolin leikti Matt Flynner í heimsflokki. Tað var gott, at hann kom vegin fram! Hann var í sær sjálvum eitt upplivilsi í dugnaskapi, skjótleika og fingrafimi. Slíkt er neyvan sæð, ella hoyrt, her áður.

Kathy legði út við Sittin' on the top of the world. Og tað gjørdi hon frá byrjan til enda á konsertini týskvøldið!

## Góð á palli

Hetta var tónleikur, sum hann eigur at vera. Væl leiktur, væl sungin og góður. Og til slíka konsert er tað ærligheitin, sum savnast verður um.

Listin er at duga hetta, at fáa tað at síggja lætt út. Ella bara at halda tað vera lætt! Víst er tað, at hóast talan var um 3 smæðin ljóðføri og eina stóra rødd, so var hetta skjótt gloymt og áhoyrarar sótu bergtiknir og gloymdu alt annað, uttan bert tónleikin.

Kathy átti pallin frá byrjan. Millum sangirnar undirhelt hon. Loyvt var til dømis at klappa, eftir góðu solospølini hjá Matt. Og vóru tey ov vánalig, so var bert at blaka við tomatum - ella fiski, um hesin var lættari at fáa hendur á!

Jú, sambandið við áhoyrararnar var tætt. Og eisini inniligt. Tí alt var ikki bara gleimur og skemt. Sangir, kanska serliga innan country, hava ofta eina skuggasíðu, og harvið eina søgu.

Tað gekk eisini upp fyri kvinnuni á palinum, at mong av hennara næstu ikki taldust millum tey livandi longur. Hóast mong teirra, ið Kathy umrøddi, vóru fólk innan country, ið ikki eru á foldum longur, so vóru millum álvarsløturnar, minst líka nógvar swingløtur.

Sum heild sangir og søgur, har vit fingu innlit og kendu samband við tónleikararnar. Hetta var framførsla av fyrstu skuffu. Væl úr hondum greidd tónlistarliga, onki mjørkatos millum løgini, men beinleiðis prát við lurtaran og harvið tónleika- og tekstaupplivingar, ið vildu nakað, høvdu eitt mið, og sum náddu innum.

Mong av løgunum vóru ognað ymsum, ofta doyðum persónum. Men eisini vóru løg, ið vóru yndisløg hjá Birgiri Kruse, ið er upphavs maður til forkunnugu vitjanina úr Nashville.

Tá lagið Crazy byrjaði eitt lagatyssi av løgum hjá Patsy Cline, mundu teir síðstu og treiskastu lurtararnir geva seg yvir.

Avbera gott!!!

## Ragnar, Hank og Dupult Kvartettin

Eftir ein støðg, kom Kathy aftur, sang nøkur løg, millum onnur sítt egna frálíka um Pilgrim (okkurt sovorði eitur tað). Síðani kom Hank Williams og I'm so lonesome I could cry.

Og eftir lítlari løtu stóð Ragnar í Vík á palli og helt á við føroyska tekstinum.

Ragnar, sum hetta kvøld var heldur fámæltur, ið mun til væl uppløgdu Kathy, sang síðani sangin um Nornuna.

Eftir hetta kom Dupult Kvartettin á pall. Hetta var stór løta, har alt gekk í hægri eind.

Fyrst sang Kathy Let the lower light shine - síðani tók kvartettin yvir við Lat hitt lægra ljósið brenna. So gekk tað slag í slag, How great thou art og so øll á palli við hinum væl swingandi I fly away, har Dupult Kvartettin rættiliga sá út til at hugna sær og prógvaði, at EISINI hetta duga teir til UG.

Liðugt var. Men takið var á veg av mentanarhúsinum av lógvbrestum, ið ynsktu Kathy aftur á pall, tá hon aftur kom innar.

Einsamøll rundaði hon av við vøgguvísu frá Peter Pan og sang yndisliga A distant melody.

Eftir konsertina var møguleiki at heilsa uppá, keypa fløgur og fáa autograf.

Eitt brak av eini konsert var tagnað, men óivað ljómar bergmálið enn í hugaheimnum hjá mongum áhoyrara, eins og fløgur ljóma í onkrarai stovu. Nakrar álvarsløtur, millum veruligt swing, við Katy Chiavola vóru farnar aftur um hesar útvið 3 tímarnar, konsertin vardi.

Gott, Kathy Chiavola, og vælkomin aftur eina aðruferð!







# Bilar

Nr. 156 • hósdagur • 16. august 2001 • 75. árg.

# Flestu bilhandlararnir komu eftir kríggið



**Heilt frá tí at Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen seldu fyrsta bilin í 1922, vóru teir so gott sum einastu bilhandlarar í Føroyum í mong ár. Eftir seinna heimsbardaga kom rættulig gongd á, og fleiri aðrir bilhandlarar fóru at lýsa í bløðunum.**

*Petur W. Háberg (1914-1984) og Jens Christian Christiansen(1916-1996), vanliga nevndur Kissa, seldu eisini bilar. Undir krígnum fóru svágrarnir báðir undir bókaútgávuvirksemi og settu á stovn Norrøna Forlagið. Eftir kríggið stovnaðu teir Bilasøluna Norrønu, og fóru at innflyta bilmerkini Standard, Triumph, Moskwitch; Simca og Plymouth. Myndin er tikin uttanfyri hjá Hans Joensen í Niels Finsensgøtu, har Kissa arbeiddi í mong ár.*

*Myndaeigari: Elin Guttesen*

*Magnus Gunnarsson*

Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen hava verið so gott sum einsamallir á marknaðinum við Ford og Chevrolet bilum. Heilsølan, Niels S. Johannesens Eftf., sum seinni fóru at selja bilmerkini Hillman og Humber, lýsir í 1939 við BSA motorsúkklum. Undir krígnum komu nógvir brúktir bilar úr Onglandi. Eftir kríggið fóru fleiri at selja bilar. Sigird av Reyni seldi Morris bilar niðri í Rættará, Charles Mauritzen seldi Austin bilar úti í Tinganesi, John & Poul Joensen seldu til dømis Jowett Javelin og Singer, Bilasølan Norrøna v.Petur Háberg og Jens Chr. Christiansen (Kissa) seldu bilmerkini Standard og Triumph , Simca og Moskwitch. Seinni fer Alfred Johannesen at selja Volvo, Francis Goldney umboðaði Peugeot og Commer, Gunnar Hansen seldi DKW, NSU og Mercedes-Benz. Jóhannes Berg fekk Ramler bilarnar í 1960 og Óli Arge innflutti fyrsta japanska bilin í 1962, ein Nippon Prince Skyline.



*Her er Ella, kona Frits Jensen í teirra snøgga Austin bili, allarhelst ein Austin 10 frá 40-árunum. Frits dámdi væl at pynta bilar, og hesin hevur t.d. hvítar dekksíður og eyka tokulyktir. Leggið til merkis at framhurðarnar eru hongslaðar í afturkant. Frits Jensen hevði í mong ár Essostøðina í Gundadali, har hann m.a. seldi hópin av Fiat bilum.*

*Myndaeigari: Eivind av Reyni*



*Josefina og Sigird av Reyni við einum Austin A40, sum var ein av fyrstu nýggju Austin modellunum eftir kríggið. Í 1947 fekk Sigird av Reyni umboð fyri Morris bilarnar. Hann helt til niðri í Rættará, meðan fyritøkan Charles Mauritzen við Robert P.Brockie sum stjóra, umboðaði Austin bilarnar úti í Tinganesi.*

*Myndaeigari: Eivind av Reyni*

*Lýsing hjá Alfred Johannesen í 1960. Alfred, sum eisini var reiðari og heilsølumaður, helt til við Tinghúsvegin. Service og umvælingar hevði bilverkstaðurin hjá Sverra Djurhuus.*






| | |
|---|---|
| **Farodane & Co.**, pf., Tinghúsv. 7 . . | 1414 |
| **Hansen, Gunnar**, Lucas Debesarg. 2 | 2202 |
| **Jensen, Frits**, Gundadalur . . . . . . . . | 2275 |
| **Joensen, John & Poul**, J. Broncksgøta 25 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 1325 |
| **Johannesen, Alfred**, Tinghúsv. 46 . . | 1735 |
| **Mauritzen & Co.**, A/S, Tinganes . . | 1748 |
| **Nielsen, Vilhelm**, J. Broncksgøta 35 | 1140 |
| **Norrøna**, Niels Finsensgøta 15 . . . . | 2050 |
| **Petersen, Wenzel**, fa., Bryggjubakki | 1173 |
| **Reyni, Sigird av**, Sigmundargøta 24 | 2145 |
| **Skæling, Magnus**, fa., Sverrisg. 20 | 1781 |

*Yvirlit yvir nakrar av bilhandlarunum í Telefonbókini í 1962.*

